## HEILSANIR





**Góða, fitta Linda**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 26. mai og heilsan til babba við degnum 18. mai, eg eri so góður við teg.
**Heilsan, Erik**



**Hey, Ann**
Tillukku við degnum 24.5. Hendan rótin smakkaði væl, minnist tú!
**Heilsan, ein ið var við**



**Góði, elskaði Ronni**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag og alt tað besta ynskja vit,
**mamma, babba, Steffan og Teitur**



**Góða Sigrid**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum 28. mai.
**Heilsan Johan**



**Góði, elskaði Hjarnar**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum í dag og alt gott í framtíðini ynskja
**omma, abbi og Mekhala**



**Góða Ann**
Hjartaliga tillukku við teimum ?, nei gott er.
**Gita hvør**



**Góða, fitta Kristina**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 26.5. Vit elska teg.
**Mamma, babba, Jóhan og Rani**



**Góði, fitti Høgni**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum ynskir
**Ari xxx**



**Góða Birgith**
Hjartaliga tillukku við 2x20 ára føðingardegnum. Tú helt kanska at tú slapp undan, ha-ha-ha!
**Heilsan, mýrurnar**



**Góða Birgith**
Lukku og gleði á 2x20 ára degi. Vælkomin upp til okkum »UNGU«.
**Heilsan, frellurnar**





**Bilur við skaða til sølu**

**Merki:** BMW 318 TDS
**Árg.:** 1995
**Km:** 83.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
tlf. 34 57 71
fax nr. 34 56 07
e-mail: bjb@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

**Bilur til sølu**



VW GOLF 1.8, árg. 6/95, koyrt 73.000 km, til sølu.

Bilurin hevur ABS-bremsur, 2 Airbag, alu-felgur, fløguspælara, org. sóltak. Heilársdekk á felgum fylgja við. Bilurin er væl hildin og í sera góðum standi.

**Tlf. 312032**




## TILTØK

### FØÐINGAR

4. mai fingu Aslaug og Sámal Hansen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3880 gr.

12. mai fingu Rudi Nielsen og Søren Lünell Bruhn, Trongisvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3760 gr.

14. mai fingu Anna E. Jacobsen, Tvøroyri og René Thomsen, Sumba, ein son. hann var 42 cm. langur og vigaði 1700 gr.

16. mai fingu Joanita og Jan Jacobsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

17. mai fingu Lisa Nielsen og Jacob Vilhelm, Vágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3900 gr.

17. mai fingu Alisa og Dánial Jákup Jakobsen, Skálavík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3900 gr.

18. mai fingu Óluva og Andrias Poulsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4400 gr.

18. mai fingu Olivia og Jákup Súni Berg, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3950. Hann eitur Jósef.

18. mai fingu Jónhild og Brian Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

19. mai fingu Sonja og Petur í Gong, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3550 gr.

19. mai fingu Maud S. Simonsen og Fabio De Marco, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3760 gr.

19. mai fingu Mia og Hjartvard Kjærbæk, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

20. mai fingu Heidi og Eyðfinn Magnussen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4960 gr.

21. mai fingu Fríða og Álvur Haraldsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3625 gr.

21. mai fingu Unn Bjarnadóttir og Annfinn Joensen, Sørvágur, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3700 gr.

22. mai fingu Maria Eliasen og Jón Magnussen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2600 gr.

22. mai fingu Barbara Petersen og Hans Martin Høj, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.



13. apríl fingu Teitur og Egin Tollaksson eina systur, hon var 53 cm. long og vigaði 4150 gr. Foreldur eru Kristvør og Tollakur Joensen, Norðragøta



Hey, eg eiti Rebekka. Mamma og babba eita Laila og Jón, Nyborg.
13. apríl fekk eg ein beiggja, ið eitur Lukas

### ANDLÁT

**15. mai**
Magnhild Heinesen, Tórshavn, 71 ár.

**18. mai**
Marius Olsen, búsitandi í Vestmanna, ættaður úr Hósvík, 84 ár.
Esmar Olsen, búsitandi í Havn, ættaður av Húsum, 71 ár.
Dia Petersen, Sørvágur, 28 ár.

**19. mai**
Bent Rubeksen, Tórshavn, 64 ár.

**21. mai**
Magnus Emil Poulsen, vanliga nevndur Magge í Brekkum, Toftir, 83 ár.

**22. mai**
Petur Joensen, Eiði, 65 ár.
Robert Hansen, Nólsoy, 61 ár.
Hermina Stakslíð, vanliga nevnd Mina, Tjørnuvík, 84 ár.

**Gudstænastur Trinitatissunnudagur**
*Fuglafjørður:* kl. 11, familjugudstænasta, Uni Næs. Talvan gongur fyri Ytri Missión
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Húsar:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri J. Joensen
*Eiði:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
*Haldórsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Gøta:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Henning Nielsen
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Hov:* kl. 11 Ólavur Rasmussen
*Svínoy:* kl. 12, (útvarpað), Elsa Funding
*Gásadalur:* kl. 11,
*Mykines:* kl. 18, David Johannesen
*Funningur:* kl. 11 messa,
*Gjógv:* kl. 12.30 messa, Emil Olsen
*Vestmanna:* kl. 11, Inga Poulsen Dam

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Heimasíða: www.hebron.fo

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids (Barnaklubbur). Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Morgungudtænasta v/ Debbi Joensen, kl. 14 Sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti uppi á Brekku 3.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11 Útifundur í gongugøtuni, kl. 16 Horntónleikur á bátastevnuni í Vestmanna og Útifundur um kvøldið.
Sunnudagin kl. 11 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 Møti fyri alla familjuna (diplom til títlinga sangararnar). Drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Suna Joensen.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. fl. og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti v/ Duritu og Ejvind Mouritsen.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti, kl. 20 Manskórið venur.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni.
Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Gordon E. Grieve, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 18 Møti – Annelisa Berthelsen.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Norðstreymoy**
Til allar kvinnur í Norðstreymoy. Hugnakvøld verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20. Á skránni verður sangur, drekkamunnur og lívgandi orð. Allar eru vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evang. møti v/ Eiler Johannesen. Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Hugnaløta, har Jórun og Nurlan Malaikev koma at greiða frá arbeiðinum millum gøtubørnini í Kiev. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi. Kalle og Jórun Jacobsen luttaka. Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Eyðun Jacobsen. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Útimøti á Skála kl. 20.30. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Filadelfia, Gøta**
Møtirøðin við Pól Færø heldur fram fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnumorgunin kl. 11. Breyðbróting verður kl. 13.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Marjan Nielsen, Nes og ungdómsmøti verður kl. 21.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við breyðbróting og evangel. møti verður kl. 17 við sangi og vitnisburði. Ungdómsbólkurin møtir mánadagin kl. 20.00.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12 breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 luttekur Høgni Jóhannesen. Evni er bøn.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Møti verður í Samljóð leygardagin kl. 20 fyri kvinnum og monnum. Jónhilda og Gullak Hansen luttaka. Vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið, fyri allar kvinnur.

**Vitnið, Hvalba**
Osvald Kjærbo talar á evangeliska møtinum sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Vikuskiftismøti í Hirtshals**
24.-26. mai í Hirtshals missiónshúsi.
Møti í Aulum missiónshúsi 27. mai kl. 19.30 v/Kórinum í Meinigheitshúsinum í Tórshavn.
Møti í Tarm missiónshúsi týsdagin 28. mai kl. 19.30 v/ Hera Elttør og Meinigheitskórinum.
Møti í Hjørring umráðnum 30. mai til 1. juni v/ Hera Elttør og Meinigheitskórinum.
Allir føroyingar eru hjartaliga vælkomnir til hesi møti, fleiri upplýsingar kunnu fáast frá Hera Elttør tlf. 97 473786.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Jesur sigur í Matt. 28. 18-20: »Mær er fingið alt valdið í himli og á jørð, v. 19. Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað, at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, v. 20, og við tað, at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum. Og sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda«.*

Fyri at skilja hesi vælkendu orðini til fulnar, mega vit kenna bakgrundina. Jesus er nýliga upprisin, og tí hvíla eisini hesi orðini á uppreisnina, á tað fullgjørda verkið á Golgata.

Jesus hevur boðið vinum sínum at koma saman við honum á einum fjalli í Galileu fyri seinastu ferð, áðrenn hann fer frá teimum. Tann gerning, hann hevur byrjað her, letur hann nú upp í hendurnar á lærusveinum sínum. Nú skulu teir halda áfram við tí gerningi hann hevði fullført.

Og so byrjar Jesus: *»Mær er fingið alt valdið í himni og á jørð«.*

Jesus hevur elskað mest, og hevur latið hitt størsta offur, tí er tað at hann hevur fingið henda rætt og hetta vald, og tí vil hann altíð hava tað. Hann bar allar heimsins syndir, tí eigur hann rættin til at hava alt vald á øllum heiminum. Og tí hevur hann eisini rættin til at hava alt vald á okkum. Vit eru dýrtkeypt við hansara blóði. Eingin annar hevur tí rætt til at eiga okkum og ráða yvir okkum enn Jesus.

*Farið tí og gerið øll fólkasløg til lærusveinar mínar.*

Hetta er eitt stórt boð, men tað er Jesu boð og vilji.

Hesi boðini kunnu tykjast ómøgulig at klára. Men teir fyrstu lærusveinarnir hjá Jesus vóru lýdnir hesum boðum og orði. Teir fóru út og vunnu nýggjar lærusveinar fyri Jesusi. Tað sama kallar Jesus okkum til í dag. Hann kallar okkum til at blíva ein Jesu lærusveinur, soleiðis at hansara ríkið kann vinna fram um allan heimin. Tí er spurningurin til okkara. Eru vit lýðin hansara kalli og hansara boðum? Vilja vit verða við í hesum stóra arbeiði?

*Við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda.*

Hetta vóru boðini lærusveinarnir fingu. Við at doypa tey til samfelags við hin tríeiniga Guð skulu teir gera øll fólk til Jesu lærusveinar. Her er eingin undantikin. Tí hetta er Guðs verk. Hetta er gávan hann vil geva tí fallnu mannaætt. Hann vil geva hana til bæði stór og smá, ung og gomul, lærd og leik. Og so leggur hann aftrat: Og við tað, at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum. Hetta er ein stór uppgáva. Ein uppgáva, ið allar kristnar kirkjur og samkomur eru samdar um at røkja, sjálvt um tað er ymiskt hvat dent vit leggja í dópin í okkara læru. Við hesum boðum, við hesi uppgávu vísir Jesus okkum á, at um vit skulu verða hansara lærusveinar, mega vit eisini læra at halda boð hansara, ikki bert ein part av tí, men alt tað hann hevur boðið okum. Og tað er eisini tað sum eyðkennir ein Jesu lærusvein, at Guðs orð er ein lykt fyri fóti mínum, eitt ljós á gøtu míni. Sjálvt um heimurin broytist, sjálvt um menniskjan broytist, so broytist ikki Guðs orð. Tí eiga vit at lesa sum skrivað stendur, trúgva, sum skrivað stendur og ikki minst, gera sum skrivað stendur. Tá vilja vit eisini uppliva kraftina í tí lyftinum sum Jesus gevur okkum lut í: Eg eri við tykkum allar dagar, alt til veraldar enda.

Amen!

**Hans Eiler Hammer, prestur**